

# Sagex og Føroya Kolvetni á borðið hjá norska vinnumálaráðharranum

JAN MÜLLER

Fútaborboðið, sum ein undirrættur í Oslo herfyri legði móti trimum ráðgevum hjá Føroya Kolvetni, er nú komið heilt upp á ráðharrastøði. Tað er norski vinstratingmaðurin, Terje Johansen, sum hevur biðið vinnu- og handilsmálaráðharran Grete Knudsen svara spurningi í málinum.

Spurningurin er soljóðandi:

„Norsk Hydro søker å hindre det færøyske oljeselskapet Føroya Kolvetni fra å søke konsesjon på færøysk sokkel med begrunnelse at det har benyttet tidligere Sagaansatte.

Mener statsråden det er anstendig at Norsk Hydro søker å hindre færøyske interesser i å delta i utvinning av egne ressurser?

Begrunnelse:
Norsk Hydro har i Namsretten fått kjennelse for at tre tidligere Sagaansatte ikke får arbeide på færøysk og britisk sokkel. Kjennelsen er anket til Lagmannsretten. I mellomtiden er det nystartede, private selskapet Føroya Kolvetni ikke bare forhindret fra å benytte norsk arbeidskraft, ledig-gjort av Norsk Hydro, men søkes altså stoppet i å søke konsesjoner på egen sokkel. Det er opp til retten å avgjøre lovligheten av Norsk Hydros aksjoner, men jeg ber statsråden vurdere nærmere om det er ønskelig at et selskap, hvor staten er største aksjonær, søker å hindre andre nasjoners forsøk på aktivt å bygge opp eget næringsliv?

Dersom statsråden er av den oppfatning at staten som eier ikke kan eller bør gripe inn i Norsk Hydros aktiviteter i andre land, selv om disse strider mot norsk utenrikspolitikk, kan statsråden da grunngi statens eierskap i Norsk Hydro?“

Tað var ein undirættur í Oslo, sum herfyri tók undir við einum kravi frá Norsk Hydro um, at trý fyrrverandi Sagafólk brúktu vitan frá Sagatíðini til at hjálpa einum øðrum oljufelag í eini útbjóðing. Talan er um føroyska oljufelagið Føroya Kolvetni. Norski rætturin settur teimum trimum oljufólkunum í felagnum Sagex, ið hevði gjørt samstarvsavtalu við Føroya Kolvetni, fútaforboð. Hesir við Terja Hagevang á odda hava síðani kært avgerðina til landsrættin, sum aftur hevur givið Norsk Hydro eina viku at koma við einum svari uppá kæruna. Tann tíðin er um at ganga út. Sosialurin skilur støðuna soleiðis, at um Sagexfólkini ikki fáa viðhald í landsrættinum og harvið sleppa at halda fram í arbeiðinum fyri Føroya Kolvetni, so er tann møguleikin til steðar, at Norsk Hydro fer at tvinga Føroya Kolvetni at taka seg úr fyrstu rundu á føroyskum øki, nú tað m. a. byggir sína umsókn uppá ráðgevingina hjá teimum trimum Sagaxfólkunum.



Kamal Yosuf og Kaj Ove Krogh - ella Kamal Ahmed Krogh, sum hansra islamska navn er, hava seinastu dagarnar kunna føroyingar um islam. Teir hoyra til eina islamska rørslu, ið trýr, at Messias varð føddur í Pakistan í 1835
Mynd: Álvur Haraldsen

# Kunna føroyingar um islam

*Seinastu dagarnar hava tveir umboðsmenn fyri Islamsahmadiya-rørsluna í Norðurlondum vitjað í Føroyum. Teir vilja kunna Norðurlond um islam. M. a. hevur Leivur Hansen, borgarstjóri í Havn fingið eitt eintak av koranini*

EIRIKUR LINDENSKOV

Seinastu dagarnar hava tveir mans frá Islamsahmadiya-rørsluni í Hvidovre í Danmark verið í Føroyum. Endamálið við hesi ferðinin hevur verið at kunna føroyingar um islam.

– Vit vilja á henda hátt royna at koma í samband við fólk í Føroyum fyri at kunna tey um islam, sigur Kaj Ove Krogh - ella Kamal Ahmed Krogh, sum hansra islamska navn er.

Kamal Ahmed Krogh er dani, man hann konverteraði til islamska trúgv í 1966. Tað var um 1960 at Islamsahmadiya-rørslan so smátt byrjaði við tiltøkum í Danmark, men í 1967 varð rørslan stovnað í Danmark, og tá var eisini Nusart Djahan Moskéin í Hvidovre tikin í nýtslu.

Islamsahmadiya-rørslan er ein heimsumfatandi rørsla við yvir 30 milliónum limum. Hon var stovnað í India í 1800-talinum, og tey trúgva upp á, at Messias er afturkomin. Hann var føddur í Quadian í Pakistan í 1835, og navn hansara er Hazrat Mirza Ghulan Ahmed. Hann doyði í 1908.

Hazrat Mirza Ghulan Ahmed fekk eina opinbering – at hann skuldi fáa boðskap ín út til fjarastu øki heimsins.

– Quadian var ikki júst heimsins nalvi, men boðskapurin er kortini komin til Norðurlond - og nú eisini til Føroya, sigur Kaj Ove Krogh

Kaj Ove Krogh leggur dent á, at teir als ikki eru tað slagið av muslimum, sum vit javnan hoyra um í fjølmiðlunum.

– Vit eru av teirri fatan, at vit altíð skulu liva sum lóglýdnir borgarar í hvørjum landi, tað enn skal vera, og undir teirri stýrisskipan, sum nú einaferð er galdandi, um hon er politisk ella religiøs. Tað respektera vit fult og heilt, sigur hann.

Saman við Kaj Ove Krogh í Føroyum er eisini Kamal Yosuf, sum hevur umboðað rørsluna í Norðurlondum, bæði í Danmark, Svøríki, Noreg og Finnlandi.

Teir siga báðir, at rørslan í Danmark í veruleikanum er vorðin ein stovnur.

– Nógv fólk koma til okkara fyri at fáa meira at vita um islam, bæði lesandi, og onnur, ið hava tørv á tí.. Vit gera sjálvandi einki fyri at umvenda tey til okkara trúgv - hóast vit eru fegin, tá fólk venda um. Men tað er ikki okkara skilda - hetta er eitt val hjá tí einstaka, sigur Kaj Ove Krogh.

Í Føroyum hava teir roynt at gjørt vart við seg á ymsan hátt. M. a. høvdu teir ætlað at hitt ymsar persónar, so sum bisp, løgtingsformannin og borgarstjóran í Havn fyri at handað teimum koranina, men tað hevði bara eydnast teimum at handað Leivi Hansen, borgarstóra í Havn koranina. Hinum báðum høvdu teir einki hoyrt aftur frá.

Nú 1000 ára haldið verður fyri kristnanini í Føroyum um hvítusunnuna, spurdu vit teir, um hetta var orsøkin til, at teir júst vórðu komnir hendan vegin nú.

– Tað kundi kanska tykts so, men so er ikki. Tað var onkur sum segði okkum, tá vit søgdu, at vit skuldu til Føroya at greiða frá islam, at hetta fór at verða ein søgulig vitjan. Ikki tí vit taka okkum sjálvar so hátíðarliga — men kortini í álvara — so hildu vit, at boðskapur okkara sjálvandi kundi borið frukt, men vit vistu als einki um, at drotningin eisini skuldu vitjað her nú, sigur Kaj Ove Krogh.

Hann greiðir víðari frá, at teir eru her av egnum ávum.

– Vit hava hoyrt um, at einstakir muslimar eru her. Men vit hava ikki hitt nakran, sigur hann.

Kaj Ove greiðir annars frá, at teir eisini hava eitt religiøst yvirhøvd.

– Hann nevna vit Kalif. Hann býr í London, men er úr Pakistan.

Hann greiðir frá, at teirra muslimska rørsla hevur nógv felags við tey fyrstu kristnu.

– Vit trúgva jú eisini upp á, at Messias er afturkomin. Eins og tey fyrstu kristnu, so verða vit forfylgd - og serliga í Pakistan, har okkara Messias varð føddur. Hetta er orsøkin til, at okkara átrúnaðarliga yvirhøvd býr í London, sigur hann.

Kaj Ove Krogh leggur kortini afturat, at tað ikki er allur tann muslimski heimurin, sum forfylgir Messiastrúgvandi Islamsahmadiya-rørsluni. Í Pakistan hevur islam ein serligan politiskan karakter, sigur hann.



*Hazrat Mirza Ghulan Ahmed er Messias hjá hesi muslimsku rørslu. Hann varð føddur í Pakistan í 1835*



*Málið um Vágatunnilin er nú tikið upp í samgonguni:*

# Tjóðveldið krevur at avtalan verður hildin

*–Vit hava kravt, at tilmælið hjá Landsverkfrøðinginum verður fylgt, og tað hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum bara at syrgja fyri, sigur Høgni Hoydal*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tjóðveldisflokkurin krevur nú, at tilmælið hjá Landsverkfrøðinginum um at Byggitek skal fáa arbeiðið at gera vegirnar í sambandi við Vágatunnilin, verður fylgt.

Hetta er greitt, eftir at Vágatunnilin hevur verið til viðgerðar á Landssstýrisfundi nú í hesi vikuni.

Málið kom á borðið á landsstýrisfundi, eftir at nevndin fyri P/F Vágatunnlinum gjørdi av at taka samráðingar upp við J&K Petersen um at gera vegirnar í sambandi við undirsjóvartunnilin, hóast Landsverkfrøðingurin mælti til at taka av tilboðnum hjá Byggitek, sum var lægri.

Formaður Tjóðveldisfloksins sigur, at samgongan hevur eina púra greiða avtalu um, hvussu farast skal fram í sambandi við Vágatunnilin.

–Tað stóra, politiska stríðið í sambandi við undirsjóvartunnilin varð um, hvør, skuldi hava ábyrgdina av arbeiðnum og eftirlit við at alt fór rætt fram, landskassans vegna.

– Tað endaði við eini greiðari semju um, at P/F Vágatunnilin skuldi gera arbeiðið, men at Landsverkfrøðingurin skuldi hava ábyrgdina og eftirlitið vegna landskassan.

– Og hvat vegunum í sambandi við tunnilin viðvíkur, var avtalað í samgonguni, at Landsverkfrøðingurin skuldi standa fyri útbjóðingin og hann skuldi eisini gera tilmæli um, hvør skuldi fáa arbeiðið.

– Tað var ómetaliga týdningarmikið fyri okkum, at Landsverkfrøðingurin fekk ein avgerðandi leiklut í arbeiðnum, tí tað er umráðandi, at serfrøðin á økinum verður savnað á føroyskum hondum og tað var hetta, sum avtalan gekk út uppá.

**Missur trúðvirðið**

Høgni Hoydal sigur, at Landsverkfrøðingurin hevur gjørt sín part av arbeiðnum og hann hevur eisini gjørt eitt tilmæli um, hvør fáa arbeiðið at gera vegirnar.

–Og tað er heilt greitt, at øll byggiætlanin missir trúvirðið, nú nevndin fyri Vágatunlinum hevur gjørt av ikki at fylgja tilmælinum um at Byggitek skuldi gera arbeiðið.

Høgni Hoydal, sigur, at tað er hetta, sum Tjóðveldisflokkurin nú hevur gjørt landsstýrismanninum í vinnumálum púra greitt.

– Vit hava ikki gjørt annað enn at krevja, at tann politiska avtalan verður hildin, leggur hann afturat.

Í tí liggur at Tjóðveldisflokkurin hevur kravt, at Landsverkfrøðingurin fær tann leiklut í byggiætlanini, sum samgongan hevði avtalað, at hann skuldi fáa.

*Liggur tað eisini í tí, at tilmælið hjá Landsverkfrøðinginum verður fylgt?*

– Sjálvandi. Og tað liggur eisini í tí, at landsstýrismaðurin skal syrgja fyri, at tað verður farið soleiðis fram, at tað ikki kann reisast ein tann einasti ivi um, at alt fer rætt fram í sambandi við byggiætlanina.

Høgni Hoydal hevur tó onga viðmerking til, um hann hevur mist álitið á nevndini í P/F Vágatunlinum eftir hetta.

Men hann sigur kortini, at tað, sum er hent hesar seinastu dagarnar, sáar stóran iva um byggiætlanina og tað er hetta, sum málið snýr seg um.

– Hetta snýr seg nevniliga ikki bara um ein undirsjóvartunnil. Hetta snýr seg eisini um alla framtíðar útbygging í Føroyum á samferðsluøkinum.

–Tí er tað ógvuliga avgerðandi, at bæði politiska valdið og almenningurin kunnu hava fult álit á byggiætlanini.

– Og fyri, at beina allan iva burtur, hava vit kravt, at tilmælið hjá Landsverkfrøðinginum verður fylgt.

*Hevur tað verið frammi, at hetta eigur at fáa avleiðingar fyri nakran av pørtunum í málinum*

– Tað havi eg ongar viðmerkingar til, sigur Høgni Hoydal.

Hann hevur heldur ongar viðmerkingar til, hvussu landsstýrismaðurin í vinnumálum skal fara fram fyri at tryggja, at tilmælið hjá Landsverkfrøðinginum verður fylgt.

–Men Landsstýrismaðurin hevur ábyrgd mótvegis samgonguni og tinginum fyri, at tær politisku avtalurnar verða hildnar, og tað má hann so syrgja fyri.

– Hvørji amboð hann brúkar fara vit ikki at leggja okkum út í.

*Men var tað ikki nettupp fyri at sleppa undan politiskari uppílegging, at eitt partafelag varð stovnað at standa fyri arbeiðnum?*

– Jú og tað allar ringasta av øllum í hesum málinum, at nú sita vit júst og viðgera tað politiskt, sum skuldi verið so sjálvsagt at serfrøðingarnir hjá P/F Vágatunlinum avgreiddi.

– Hetta er ein ómetaliga óheppin støða. Og tað er bara eitt at gera og tað er at bera so í bandi, at almenningur og politiska skipanin kunnu hava fult álit á byggiætlanini.

*Tit hava fingið eina frágreiðing um, hví P/F Vágatunnilin tók samráðingar upp við J&K Petersen og ikki við Byggitek. Hevur tann frágreiðingin ikki sissað tykkum?*

– Tað er málinum fullkomiliga óviðkomandi. Vit hava als ongan áhuga í frágreiðingum, sum meta eitt byggifelag upp ímóti einum øðrum og vit hava als ongan áhuga í at leggja okkum út í sjálva byggiætlanina. Tað er heilt óhoyrt, at politikarar ganga og meta um einstøk feløg.

– Tað einasta, sum vit krevja, er at tær politisku avtalurnar verða hildnar, endurtekur Høgni Hoydal.




*Spurningurin um, hvør skal gera vegirnar í sambandi við Vágatunnilin, er nú endaður á landsstýrisborði. Tjóðveldisflokkurin krevur, at Finnbogi Arge ber so í bandi, at ikki ein tann einasti ivi kann sáast um byggiætlanina, sigur Høgni Hoydal, floksformaður*

# Javnaðarfólk á summarstevnu

*Tiltøk verða bæði í Klaksvík og í Mikladali næsta vikuskiftið*

Næsta vikuskiftið, 16. og 17. juni, fara javnaðarfólk á summarstevnu.

Hetta er triðju ferð, at javnaðarfólk fara á slíka stevnu, og hesuferð verður hon í Norðoyggjum, har Norðoya Javnaðarfelag er vertur. Talan er um ein blanding av eini útferð og einum politiskum tiltaki, tí fólk eru vælkomin at taka alt húskið við.

Fríggjakvøldið verður eit mentanarkvøld í Klaksvík við sangi, tónleiki, upplestri o.ø.

Leygardagin verður ein blandingur av eini útferð og einum politiskum fundi. Leiðin gongur til Mikladals, har tað eisini verður politiskur fundur.

Viðrar, verður fundurin uttandura, men viðrar ikki, verður roynt at finna tak yvir høvdið onkustaðni. Á fundinum verða tríggjar røður, sum eisini skulu verða upplegg til kjak ímillum fundarfólkið.

Jóannes Eidesgaard fer at siga nøkur orð um ríkisrættarligu støðuna.

Hetta verður uttan iva ein sera aktuell røða, tí hetta er beint aftaná triðja samráðingarumfarið ímillum Landsstýrið og donsku stjórnina um fullveldið- og tað eru mong sum halda, at júst hesin fundurin verður heilt avgerðandi fyri gongdina framyvir. Kristian Magnussen fer at halda røðu um privatiseringar. Og at enda fer Vilhelm Johannesen at siga nøkur orð um støðuna hjá útjaðaranum.

Leygarkvøldið verður aftur hugnakvøld í Klaksvík við onkrum til matna.


# FRAMSÝNING
## í Smiðjuni í Lítluvík

við Helga Joensen og Anker Eli Petersen

| | |
|---|---|
| Sunnudag 4. juni | kl. 14.00 - 20.00 |
| Mánad. 5. - leygard. 10. juni | kl. 11.00 - 20.00 |
| Sunnudag 11. juni | kl. 14.00 - 20.00 |




SANSIR TEL 355 355

3arin

SMS - Tel. 353535 - Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo